# Tekur undir við landsst

**FISKIDAGAR** Tá vinnunevndin mikudagin legði álit fyri løgtingið um fiskidagar fyri komandi fiskiár, hevði nevndin býtt seg í ein meiriluta, sum umboðar samgonguflokkarnar á tingi og tveir minnilutar, sum umboða ávikavist Tjóðveldi og Sjálvsstýrisflokkin

Vilmund Jacobsen

Tað var hin 29. juli, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, legði uppskot fyri løgtingið um fiskidagar fyri komandi fiskiár. Eftir fyrstu viðgerð á løgtingi hin 5. august, varð málið beint í vinnunevndina.

Vinnunevndin hevur viðgjørt uppskotið á fundum í tíðarskeiðnum 6.-11. august, har nevndin eisini hevur havt fundir við eitt nú umboð fyri Føroya Reiðarafelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Fiskidaganevndin, Havstovuna, Fiskiveiðieftirlitið og landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Í sínum uppskoti mælir Jacob Vestergaard til, at smáu útróðrarbátarnir í bólki 5 skulu missa tilsamans 5.000 fiskidagar, men meirilutin í vinnunevndini, umboðandi samgonguflokkarnar, heldur, at skerjingin heldur skal verða 4.000 fiskidagar.

Jacob Vestergaard hevði ongar aðrar beinleiðis skerjingar av fiskidøgum við í sínum uppskoti, men ymiskar aðrar broytingar, sum vit fara at venda aftur til.

### Smáar skerjingar

Meirilutin í vinnunevndini mælir hinvegin til onkrar smærri skerjingar av fiskidøgum, eitt nú hjá partrolaraflotanum og hjá teimum stóru línuskipunum.

Mælt verður soleiðis til, at dagatalið hjá partrolarum og línubátum, sum eru størri enn 110 brt. verður skert við umleið 3%. Haraftrat mælir meirilutin í vinnunevndini til, at dagatalið, sum landsstýrismaðurin í sínum uppskoti hevur tillutað lemmatrolarum á innari leið, verður 10% minni, enn tað, sum landsstýrismaðurin ætlaði at geva hesum skipum.

Lemmatrolarar hava ikki verið við í fiskidagaskipanini áður, men eru í uppskotinum til fiskidagar fyri komandi fiskiár komnir við í skipanina – við tillutaðum fiskidøgum á ytri leið og á innari leið.

### Stórur skrivifeilur

Eftir at tilmælið hjá vinnunevndini varð lagt fyri løgtingið mikudagin, er komið fram, at ein rættiliga stórur skrivifeilur er í uppskotinum hjá meirilutanum við fiskidøgunum hjá stóru línuskipunum.

Tilmælini hjá ávikavist meiriluta og minnilutum í vinnunevndini eru skrivaði í fiskidøgum – og ikki í prosentum - og tað er her, at ein stórur skrivifeilur er hendur, tá ræður um stóru línuskipini í tilmælinum hjá meirilutanum.

Skerjingin í døgum svarar nevniliga ikki til ætlaðu 3%, men liggur nærri teimum 37%!

Væntandi er tó, at ein slíkur skrivifeilur verður rættaður, áðrenn fiskidagarnir fyri komandi fiskiár verða endaliga samtyktir á løgtingi.

Tey, sum umboða meirilutatilmælið hjá vinnunevndini, eru

Katrin Dahl Jakobsen, Bjørn Kalsø, Heðin Athar Zachariasen, Bjarni Djurholm og Mikkjal Sørensen.

Minnilutarnir í vinnu-



**SKRIVIFEILUR**

*Meirilutin í vinnunevndini, sum umboðar samgonguflokkarnar á tingi, hevur framt ein rættiliga stóran skrivifeil í sínum tilmæli um fiskidagar hjá stóru línuskipunum. Ætlanin hjá meirilutanum var at skerja dagatalið hjá hesum skipum við 3%, men í tilmælinum svarar skerjingin til eini 37%*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Brúksskylda fer at økja um veiðitrýstið

**FISKIDAGAR** Vinnunevnd løgtingsins tekur ikki undir við landsstýrismanninum, sum mælir til, at brúksskylda verður sett á fiskidagar

Vilmund Jacobsen

Hóast vinnunevnd løgtingsins undir viðgerðini av uppskoti landsstýrisins um fiskidagar fyri komandi fiskiár ikki kundi semjast um eitt álit, er nevndin kortini samd um, at uppskotið hjá Jacobi Vestergaard um brúksskyldu á fiskidøgum ikki er heppið.

Tað er Katrin Dahl Jakobsen, sum er forkvinna í vinnunevndini, og hon heldur, at brúksskylda fer at økja um veiðitrýstið.

Vinnunevndin er í prinsippinum samd við landsstýrismannin um, at skip og bátar, sum í skipanini hava ov fáar fiskidagar, eiga at fáa hesar dagar heldur enn, at aðrir, sum ikki brúka dagarnar, liggja omaná teimum og kunnu selja teir.

Landsstýrismaðurin skeyt nevniliga upp, at óbrúktir fiskidagar skulu kunna lutast út til aðrar, sum hava ov fáar dagar, tá tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum.

Tó at vinnunevndin tekur undir við hesum, tekur nevndin kortini ikki undir við tí partinum av uppskotinum, ið snýr seg um brúksskyldu.

Forkvinnan í nevndini, Katrin Dahl Jakobsen, sigur, at vandin er, at fiskidagaskipanin ikki er rætt stillað eftir tí, sum fiskastovnarnir tola, og tí metir nevndin, at ætlaða brúksskyldan, sum landsstýrismaðurin mælir til, fer at økja enn meiri um veiðitrýstið.

vilmund@sosialurin.fo

